FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 23. oktober 2025
J. nr.: 25/27310
Viðgjørt: EC

Svar uppá fyrispurning nr. 52-028/2025 frá Anniku Olsen, løgtingskvinnu, settur Ruth Vang, landsstýriskvinnu í fíggjarmálum, um rentuskatt.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Nær vórðu reglurnar fyri rentuskatt broyttar?
2. Hvør var upprunin/orsøkin til broytingina?
3. Er landsstýriskvinnan samd í, at rentuskatturin ávirkar smáar fyritøkur og íverksetarafyritøkur meinari enn tær stóru fyritøkurnar í Føroyum?
4. Um ja, er landsstýriskvinnan sinnað at gera broytingar hesum viðvíkjandi til frama fyri smáar fyritøkur og íverksetarafyritøkur?

Svar til spurning nr. 1-4:
Skatturin av rentuinntøkum hevur í nógv ár verið 35% fyri likamligar persónar og deyðsbúgv og 18% fyri feløg, grunnar o.tíl.

Tað er vanligt, at fíggjarligar transaktiónir eru millum feløg og høvuðspartaeigarar. Um tær transaktiónirnar hava við sær, at eitt felag skyldar partaeigaranum pening, so skulu tey viðurskiftini verða viðgjørd, eins og talan var um óheftar partar.

Í februar 2015 legði TAKS dent á hesi viðurskifti og sendi eitt kunningarskriv til grannskoðarar um armslongdarregluna og lán millum nærstandandi partar. Í skrivinum varð mint á um at halda meginregluna um armslongd. Reglan varð ásett í § 37 a í skattalógini við løgtingslóg nr. 7/2004.

Armslongdarreglan snýr seg um, at *"tá ið skattskyldug inntøka verður gjørd upp, skulu nærstandandi partar nýta somu prísir og treytir í handilsligum og búskaparligum viðurskiftum, sum tá ið talan er um viðurskifti millum óheftar partar"*. Hugtakið skal skiljast breitt og fevnir t.d. um tænastur og lán.

Endamálið við armslongdarregluni er, at handlað verður eftir marknaðartreytum, og at t.d. renta verður ásett, sum tá ið óheftir partar gera avtalu um lán. Við skrivinum heitti TAKS á grannskoðarar o.o. um at upplýsa prísásetingina í handlum, sum komu undir armslongdarregluna, og boðaði eisini frá, at TAKS fór at raðfesta økið fremri.

Taka vit eitt dømi við, at eitt felag skyldar eigaranum 600 tús. kr., og rentan er 5%, so hevur felagið 30 tús. kr. í rentuútreiðslu, meðan eigarin hevur eina samsvarandi rentuinntøku. Felagið

kann draga rentuna frá í úrslitinum og rindar 5,4 tús. kr. minni í skatti. Eigarin rindar skatt á 35% av rentuinntøkuna, svarandi til 10,5 tús. kr.

Fyri eigaran og felagið undir einum er netto skatturin 5,1 tús. kr.

	Felag	Skattur	Eigari	Skattur
Nettoinntøka	100	18		
Renta	-30	**-5,4**	30	**10,5**
Avlop	70	12,6		

Sum spyrjarin vísir á, krevur tað tíð og orku at fáa eina fyritøku upp at standa. Ikki minst hevur felagið brúk fyri t.d. kreditti frá peningastovni. Endamálið er at skapa inntøkur, sum kunnu verða brúktar til løn til starvsfólk og eigara.

Eg fegnist um, at nýggjar fyritøkur verða stovnaðar. Treytirnar, undir hesum skattaviðurskifti, eiga at vera so lagaligar sum møguligt. Tað ber tó illa til at broyta grundleggjandi ásetingar um, hvat skattskyldug inntøka er, og tað er helst ikki heppið, at t.d. kapitalvinningsskatturin skal hava ymisk %-stig.

Í 2024 og 2025 er landsskatturin lækkaður fyri lægri inntøkur.

Tinganes, 23. oktober 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum